# Til minnis um abba mín Magnus Ennistíg

## f. 21. november 1925 · d. 14. mars 2006

Nú ert tú ikki her hjá okkum meira, men í hjartanum hevur tú altíð ein bústað hjá okkum øllum.

Tú ert farin til Harran, meðan vit sum sita eftir, sita við sorg, men eisini við gleði, tí tað var ikki nakað lív at bíða eftir deyðanum, vit frøast yvir, at tú ikki pínist meir. Kroppurin hjá okkum er bert til láns, tað er sálin, ið fer víðari. Tað er undarligt at síggja teg, meðan tú hvørki andar ella rørir teg.

Eg kann minnast síðstu ferð eg sá teg, tú var á sjúkrahúsinum, mamma bað meg koma norður at síggja teg, áðrenn tú fór til Harran, tár komu í míni eygu at síggja abba mín liggja í eini song og pínast. Men tú hevði styrki í tær enn, eini tvær vikur helt tú út afturat. Ikki kann eg venja meg við bara at hava ein abba eftir.

Eg kann minnast, tú fortaldi mær søgur, áðrenn eg fór at sova, onkuntíð vóru søgurnar um ommu, og onkuntíð vóru tær um teg, tá tú sum smádrongur spældi í Kunoy.

Vit báðir plagdu at sita uttanfyri kioskina í SMS, ótu ís og hugdu í sjónvarp í vindeyganum hjá Elding yvir av okkum, meðan mamma og omma gingu runt og keyptu. Og so tá eg



keddi meg í Klaksvík, so vildi eg sleppa at svimja, men tordi ikki at fara sjálvur, so komst tú við mær, ja hvat gjørdi tú ikki fyri tíni abbabørn, og tú var so glaður fyri at vera blivin langabbi. Altíð gekst tú við einum smíli, og heilsaði uppá øll. Tá ein maður í Lopra fekk at vita, at tú var deyður, segði hann »tað var snedugt, eg trúði at hasin maðurin bleiv í minsta lagi 100 ár«.

Nú ert tú komin til tann bústað, sum Jesus ger kláran til okkum, tann bústað sum tú hevur sungið og prísa Gudi fyri alt títt lív. Eg kann ætla mær, hvussu glaður tú ert at síggja Dánjal aftur. Líka mikið, hvussu gamal ella sjúkur tú vart, so steðgaði tað tær ikki at tæna Gudi.

Møti var á sjúkrahúsinum, tú hoyrdi tey syngja og tú sang við, tú hevði onki mál eftir, men tað steðgaði tær ikki í at tæna Harranum. Eg hoyrdi teg syngja tvær ferðir í morgun, men tá eg vaknaði var abbi mín enn deyður. Vit møtast aftur ein dag, men tá búgva vit ikki so langt frá hvør øðrum.

*Eg elski teg.*

**Abbasonur tín, Heri**

## Dagurin í morgin

**6. juli.** Djóni. Neyvan navn á einum halgimenni. Teir halda, at navnið av tilvild er komið upp í halgimannatalið. Djóni er stytting av grikska gudanavninum Dionysius. Um Dionysius, deyður umleið ár 258, verður sagt um dag hansara (9. oktober) Hann varð vígdur til biskup av pávanum Fabiani og fór til Fraklands sum trúboðari. Varð saman við tveimum øðrum hálshøgdur á tí staðnum, sum nú eitur Montmatre, ið merkir martýrfjallið. Best kenda halgisøgan um Dionysius er, at hann eftir at vera hálshøgdur sjálvur bar høvd sítt til tann staðin, hann vildi verða grivin. Har var kirkjan St. Denis bygd.

Aref Tórsson Olsen:

# Cand. phil prógv á Fróðskaparsetrinum

Fríggjadagin 30. juni helt Aref Tórsson Olsen kandidatfyrilestur til cand. phil prógv við heitinum »Royndir at forklára málsøguligar broytingar - alment og við serligum atliti at føroyskum«. Fyrilesturin var hildin í Loftsstovuni á Føroyamálsdeildini.



*Fríggjadagin helt Aref Tórsson Olsen kandidatfyrilestur til cand. phil prógv á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fróðskaparsetur Føroya:

# Prógv í søgu og stjórnmálafrøði

Fríggjadagin 30. juni fingu átta studentar frá Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya handað prógv eftir lokið B.A. prógv í søgu og B.S.Sc. prógv í stjórnmálafrøði.

Søgu- og samfelagsdeildin tekur upp í ár bæði til B.A. í søgu og B.S.Sc. lestur í stjórnmálafrøði.



*Tey sum fingu prógv vóru f.v.: Sóley Heradóttir Hammer, (B.S.Sc. í stjórnmálafrøði), Joan Ólavsdóttir (B.S.Sc í stjórnmálafrøði), Súsanna Martinsdóttir (B.A. í søgu), Sigfríður Abrahamsen (B.A. í søgu) Sólvá Vang (B.A. í søgu) og Súsanna Eikhólm (B.A. í søgu). Tvey eru ikki við á myndini, tey eru: Ári Rouch (B.A. í søgu) og Ingrid S. Henriksen (B.S.Sc. í stjórnmálafrøði)*

*Mynd: Jens Kristian Vang*